# Vágbingar spenna seg út til 100 ára hald



*Fríggjadagin sóust menn frá Tangavirkinum í Vági seta upp haldarar, ið vóru settir á ljóssteyrar í bygdini. Ætlanin við hesum haldarum, er at teir skulu flaggprýðast, nú føðingardagurin er, og annars nýtast, tá serlig tiltøk og hendingar eru í bygdini*

*(Mynd; Finn Johannessen)*

**Føðingardagsvikan fer ikki framvið uttan hóvasták, nú Vágs Kommuna fyllir 100 ár. Frá sunnudegnum, og eina viku fram, eru tiltøk á skránni**

100 ÁR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Vágbingar halda fyrtsu vikuna í oktober 100 áradagin hjá Vágs Kommunu. Ein hópur av tiltøkum er á skránni og skráin sæst á nýggju heimasíðuni hjá Vágs Kommunu, www.vagur.fo

Úr skránni kann nevnast, at sunnudagin 30. september er familjuguðstænasta klokkan 14. Eisini eru framsýningar av ymsum slag við list og avrikum hjá bæði vaksnum og børnum og Sang- og fyrilestrakvøld er, eins og framsýning við gomlum myndum hjá Ellen Dahl byrjar.

### Morgunsvimjing

Hvønn dag í føðingardagsvikuni er morgunsvimjing við heitum hyli í svimjihøllini í Vági millum kl. 7 og 9.

Mánadagin eru framsýningar á skránni og t.d. eru myndir av borgmeistarum at síggja í Pretty Payal og skótar hava sølu og skúlaungdómar framføra í Framtíðini.

Týsdagin avdúkar býráðið gávu til Vágs bý og har syngja eisini dagstovnabørn. Framsýningar halda fram og onnur tiltøk eru eisni. Dagurin endar við tónleika café í Pretty Payal, har tónleikanæmingar framføra og Hjalmar og Dagfinn spæla.

Mikudag er opið hús á spunavirkinum hjá Sirri, Hvistan hevur firmastafett og barnarenning og modellskip eru í svimjihylinum. Handlarnir hava opið til klokan 21.

Hósdag halda Jóan Páll Joensen og Rodmundur Nielsen fyrilestrar um vinnulív í Stóra Pakkhúsi, eldratiltak er á Eldrasambýlinum og á kvøldi hevur Vágs Býráð døgurða fyri innbodnum.

Fríggjadagin framførir tónlistaskúlin í Pretty Payal og í Billardhúsinum og á kvøldi er stór kirkjukonsert við Magna Christiansen, Heina Lutzen, Lisu Frederiksberg og tónleikarum. Eisini syngur og spælir Hjalmar Magnussen og við sær hevur hann Trónd Enni og Dagfinn Olsen.

Beint eftir konsertina í Vágs Kirkju er sangcafé í Frelsunarherinum. Spunarkapping verður um Vágs søgu í Stóra Pakkhúsi og møguleiki verður eisini at spæla paintball.

Leygardagin er Vágshøll karmur um ymiskt fra klokkan 9 til 15. Klokkan 9 er stórt morgunmatarborð og undirhald, so sum hoppiborgir og skemt, har Trølla Pætur og Bakkens Pjerrot taka lut. Annað á skránni er t.d. dagrøktin sum hevur framsýning, kvøldseta við skemti, manskóri og felagssangi. Dansur er við bæði Trio og harmonikum í høllini og All That Rain í VB Húsinum.

Sunnudagin 7. oktober skipar Vágs Kappróðrarfelag fyri ymiskum, t.d. rógving við oldboys og oldgirls úr Vági og av Tvøroyri og skúlaungdómar rógva eisini. Eisini verða vatnskí og speedbátar á fjørðinum. Øll tiltøk eru ókeypis og nærri sæst á www.vagur.fo

### Stákast

Nú um dagarnar, hava menn hjá kommununi stákast óført omanfyri deildina hjá Suðuroyar Sparikassa í Vági, har teir hava sett upp eitt spælipláss, ið kommunan letur borgarum sínum týsdagin í komandi viku.

Umframt hetta, so sóust í dag menn frá Tangavirkinum í Vági - ið bert er 25 ár yngri enn sjálv kommunan, seta upp haldarar, ið vóru settir á ljóssteyrar í bygdini.

Ætlanin við hesum haldarum, er at teir skulu flaggprýðast, nú føðingardagurin er, og annars nýtast, tá serlig tiltøk og hendingar eru í bygdini.

# Desmond Tutu á størstu norðurlendsku bókamessuni

**Suðurafrikanski erkibiskupurin Desmond Tutu vitjar í Svøríki í hesum døgum. Har er hann høvuðsnavnið á størsta norðurlendsku bókamessuni "Bok og bibliotek" í Göteborg.**

*Av Arnbjørn Ó. Dalsgarð*






Stóra árliga bóka- og bókasavnsstevnan Bok & bibliotek lat upp í Göteborg hósdagin 27. september. Við sínum fleiri enn 100.000 vitjandi og nærum 1000 framsýnarum árliga er hon nógv tann størsta bókastevnan í Norðurlondum. Á hvørjum ári er eitt høvuðstema á stevnuni, og í ár er tað Estland, við denti á estiskar rithøvundar og estiskar bókmentir.

Hetta umframt eru hópin av øðrum tiltøkum um eina ørgrynnu av evnum. Høvuðsnavnið á stevnuni í ár er suðurafrikanski erkibiskupurin Desmond Tutu, sum fekk friðarheiðursløn Nobels í 1984. Ein nýggj stór ævisøga er júst skrivað um hann, og leygardagin fer Desmond Tutu so at siga frá hendingaríku søgu sínari um fátækadrongin úr rakbýlinginum, sum gjørdist fyrsti litti erkibiskupurin í Suðurafrika og ein av heimsins fremstu stríðsmonnum fyri mannarættindum.

Bok & bibliotek heldur fram til sunnudagin 30. september.